# Skúlafótbóltur

So gongur leiðin aftur suður í Marghøllina í Vági at kappast í Skúlafótbólti.  Vit fara suður mikudagin 2. mai. Vit hava meldað 2 dreingjalið, 2 gentulið og 2 blandað lið til.

**Ferðaætlan**

Næmingarnir møta í seinasta lagi kl. 8.15 á Farstøðini. Smyril siglir kl. 8.45. Tað er gott, um næmingarnir hava spælikort og tílíkt við at hugna sær við umborð, nú tað ikki er loyvt at renna og rokast umborð.

Bussar bíða á Krambatanga og koyra okkum til Marghøllina.

Tá kappingin er liðug og vit vónandi hava verið og svomið í Páls Høll, standa bussarnir klárir við Marghøllina og koyra okkum norður aftur á Krambatanga. Smyril loysir frá bryggju kl. 18.45 og vit eru í Havn umleið kl. 20.45.

**Kostur**

Tað er umráðandi, at øll hava etið ein góðan morgunmat, áðrenn farið verður suður. Tað er ikki loyvt at keypa nakað í Smyrli á veg suður og tað ber ikki til at keypa nakran 'ordiligan mat' í Marghøllini. Tað er sostatt sera umráðandi, at øll hava ein STÓRAN matpakka við. Minnist eisini at hava ein drekkidunk við og lummapengar.

Fyrireikararnir bjóða ókeypis vatn og frukt.

**At minnast**

Minnist til ítróttarklæði, skinnarar, fótbóltsskógvar (gaggur), svimjiklæðir, stóran matpakka, drekkidunk + 20 kr til svimjing. Alt skal vera í eini tasku við navni á, so lætt er at halda skil á, hvør eigur.

Eru ivamál ella spurningar, kunnu tit altíð senda eitt sms ella ringja til Boga á tel. 280301.

Vinaliga Toymið